# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

## Denna 75



Andrasarmessudag, 30/11, fyllir ein megnarkvinna í Skopun 75 ár. Kann tað bera til, at Denna, sum er so røsk og ber seg so væl, er sjeytifimm ár? Jú, so er.

Hon er eitt sindur lítillátin og tekur neyvan undir við heitinum, megnarkvinna, men tað er hon so sanniliga. Mong munnu taka undir við tí.

Hoyrdi um ein heimasandsmann, sum einaferð bjóðaði einum kollfirðingi inn á gólvið at heilsa upp á ta avgomlu ommuna á Sandi. ”Hvat heldur tú um ommuna?” spyr heimasandsmaðurin. ”Ikki er hon stór!”svarar kollfirðingurin.

Ikki er Denna stór á vøkstri, men mikil er hon, eitt ótrúliga stórt og hjartagott menniskja.

Gestablíð er hon sum fáur; mangur hevur sitið væl og notið blíðskap í heimi teirra á Snávalsheyggi í Skopun.

So veit hon eisini so nógvar, góðar gamlar, stuttligar søgur at siga frá, bæði úr Skopun og aðrastaðni úr Sandoynni. Tað ger ikki mun, hvat tosað verður um, so kann Denna krydda prátið við onkrari av sínum søgum. Tað er hugtakandi.

Annars eru tey bæði hjúnini fróðarfólk. Tað er ikki smávegis, tey duga uttanat av sálmum og fosturlandssangum og hann av kvæðum. Eisini sera hugtakandi.

Góða Denna!

Vit takka Gudi fyri, at tú gjørdist so birg aftur. Harrin, sum tú hevur sett títt álit á, gevi tær blíðan byr víðari fram á lívsins havi.

Takk fyri, at tú ert tann, sum tú ert.

Hjartaliga til lukku við føðingardegnum!

Heilsan

**Eyðun**

## Andlát og jarðarferðir

**Jákup Augustinussen**, ættaður úr Vági, búsitandi í Hoyvík, andaðist mikudagin 29. november, 54 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Jóhannes Jacobsen,** vanliga nevndur Hanni, Kollafirður, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 29. november, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin 3. desember kl. 13 í kirkjugarðin í Kollafirði.

**Lorensa í Selvindi**, Strendur, fer til gravar úr Sjóvar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Lorensu, kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini eina peningagávu, konta í peningastovunum.

**Hanna Sofía Jørgensen** fer til gravar úr Store Maglebykirke fríggjadagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Honnu Sofíu, kunnu lata eina peningagávu til dreingirnar; konta í Føroya Sparikassa

Kistan við **Pólu Fridu Heilman**, Tvøroyri, fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 17 í Salem. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Pólu, kunnu lata Salem á Tvøroyri eina peningagávu; konta í peningstovninum.

# Lorensa í Selvindi

**30. juni 1948 - 26.11.2006**

## In memoriam



*Nú rekur tungt um Raktanga,*
*kalt strýkur lot um hógv,*
*nú syrgin Selvindsbrekku ganga*
*øll tey, sum gleddust her so nógv.*

*Vit fata lítið langnuleik*
*í lívsins loynda talvi,*
*nú frúgvin fall, og styrkin sveik,*
*og burt svann lívsins alvi.*

*Lorensa, tú oss øllum var*
*eitt ljós á lívsins gøtu,*
*sum altíð okkum blíðskap bar*
*og gylti manga løtu.*

*So still tú lívsins lagnu tók,*
*nú sjálv tú stóðst for happi,*
*nú sóttin vonda mót tær ók,*
*tú stóðst sum avrekskappi.*

*Tú vísti oss at styrki bar*
*í kærleiksfyltum heimi,*
*har móðuralskur meira var,*
*enn glóð í grúgvueimi.*
*Tú vísti oss, at vinalag*
*við gulli verður spunnið*
*so við og við hvønn virknan dag,*
*sum lívsskeið verður runnið.*

*Tú vart so stútt og stór í sinn,*
*so skær á tínum staði,*
*at øll sum komu til tín inn,*
*tey kendu vinalagið.*

*Tú vinur okkar alra var*
*við húsi tínum øllum,*
*nú andi tín mót hæddum bar*
*til heim í Himna høllum.*

*Lorensa, vit tær siga takk*
*for alt, tú okkum lærdi,*
*at vinarlag títt okkum rakk,*
*so leingi lív títt vardi.*

*Tó hús títt enn vit eiga kært*
*við øllum tínum kæru,*
*har vinalag vit fingu lært*
*við tíni góðu læru.*

*Vit goyma teg sum dýran skatt*
*í okkar innsta minni,*
*og minnast teg, tá lív var lætt*
*í tíni stovu inni*

*Títt lív for okkum glæma er,*
*sum ikki hvørva skal,*
*tí øll vit siga, nú tú fer,*
*at alt, tú var, var væl.*

**Unna & Petur Martin**

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Astrid Heinesen**

Haldórsvík

andadist á Røktarheiminum á Mørkini 27. november 85 ára gomul

Jarðarferðin verður úr Haldórsvíkar kirkju fríggjadagin 1. desember kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ása, Johild og Dávur**

Tey, ið vilja minnast Astrid við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata Røktarheiminum á Mørkini eina peningagávu.
Konta í peningastovnunum

Sagt verður frá, at kæri bróðir okkara

**Jóhannes Jacobsen**
**(Hanni)**

Kollafirði

andaðist á Landsjúkrahúsinum 29. nov. 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Landsjúkrahúskapellinum sunnudagin 3. des. kl. 13 í kirkjugarðin í Kollafirði.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bernhard, Anna og Kada**

## Dagurin

**1. desember. Arnaldur**. Er eitt av teim elstu nøvnunum í halgramanna tali, tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari.

Navnið er gamalt týskt, sett saman av arn, sum merkir ørn og wald, ið merkir tað sama sum føroyska orðið *vald, hersi.*


# M Ó T T Ø K A

Í sambandi við at »Barnagarðurin í Gerðinum« verður tikin í nýtslu, verður móttøka leygardagin 2. desember 2006 millum kl. 13.00 og kl. 17.00, har ið tit eru vælkomin at hyggja eftir stovninum.

Til tykkara kunning siglir »Teistin« av Gomlurætt kl. 13.15 og úr aftur Skopun kl. 16.30.

**Skopunar Kommuna**